# ln varð føddur



*Repuplikkanarnir valdu Abraham Lincoln til forsetavalevnið í 1860. Flokkurin var ein savnað eind. Lincoln gav lyfti til tey fátøku, at tey skuldu fáa ókeypis jørð*

Stephen Douglas. Undir valstríðnum helt Lincoln eina talu, sum hevur verið nógv endurgivin í eftirtíðini: - Eitt hús, har klandur er innan gáttina, kann ikki standa. Eg trúgvi ikki, at hetta stýrið kann halda fram í framtíðini, tá helvtin hevur trælahald, og hin helvtin er fræls. Eg vænti ikki, at uniónin verður upployst – eg vænti ikki, at húsið fer at detta sundur – men eg vænti avgjørt, at klandrið innanveggja fer at halda uppat. Lincoln og Douglas tjakaðust sjey ferðir. Lincoln umboðaði ein nýggjan flokk, repuplikkanarnar, meðan Douglas, sum hevði eitt væl smurt floksapparat aftanfyri seg, og hevði fyrimunirnar í síðsta enda, og endin var, at Douglas vann. Men røðurnar og sjónarmiðini hjá Lincoln høvdu vunnið afturljóð kring allar norðurstatirnar.

## Valdur til forseta

Mótsetningarnir millum suður og norðurstatirnar vuksu bara. 16. oktober í 1859 var tann fanatiski tr ælahaldsmótstøðumaðurin, John Brown hongdur í Virginia. Men við at drepa John Brown, so gjørdu sunnanmenn hann til eitt blóðvitni. Nú øktist mótstøðan hjá norðanmonnum ímóti trælahaldinum. Repuplikkanarnir valdu Abraham Lincoln til forsetavalevnið í 1860. Flokkurin var ein savnað eind. Lincoln gav lyfti til tey fátøku, at tey skuldu fáa ókeypis jørð. Lincoln vildi eisini arbeiða fyri einari tolllóg, sum vardi ídnaðin. Mótstøðumennirnir, John C. Breckinridge frá tí demokratiska flokkinum í suðurstatinum, og John Bell frá Unionsflokkinum vóru mótvalevnini.

Hóast Abraham Lincoln ikki stóð á atkvøðuseðlunum í 9 suðurstatum, og hóast hann bert vann 2 av 996 valstøðum í suðurstatinum, so var kortini eingin ivi um úrslitið. Lincoln ruddaði borðið í norðurstatunum, og gjørdist samlaði vinnarin. Bløðini í suðurstatunum gjørdu hvat tey kundu, fyri at spilla Lincoln út, og tey kallaðu hann líkt og ólíkt.

Staturin, South Carolina gjørdi eisini greitt, at bleiv Lincoln valdur til amerikanskan forseta, so tóku teir seg úr amerikanska samveldisríkinum. Tað fyrsta tað var greitt, at Lincoln hevði vunnið forsetavalið, komu menn saman í Charleston, og sendu eina almenna fráboðan um, at South Carolina hevði tikið seg úr amerikanska samveldisríkinum. Hini suðurstatirnir fylgdu skjótt aftaná. 8. februar í 1861 stovnaðu suðurstatirnir "The Confederal States of America". Tá Lincoln var settur sum forseti, tann 4. mars í 1861 noktaði hann at viðurkenna suðurstatirnar, sum eitt sjálvstøðugt ríki. Hann helt eina inniliga røðu, har hann heiti á suðurstatirnar um at koma uppí aftur samveldisríki. 17. apríl í 1861 fór Virginia úr samveldisríkinum, og Arkansas og North Carolina fylgdu aftaná teimum inn í tað konfederala samveldisríki í suðri.

## Blóðigt kríggj

Ov leingi verður at gjøgnumganga øll tey stóru sløgini, sum vóru í amerikanska borgarakrígnum. Alt byrjaði við, at skansin hjá norðurstatunum, Fort Sumter, sum lá inni í havnini í Charleston, høvuðstaðnum í South Carolina. Suðurstatirnir lupu á Fort Sumter, tann 12. apríl í 1861, og so var borgarakríggið ein veruleiki.



*Abraham Lincoln, 1809-1865*

Hóast sunnanmennirnir vóru væl færri enn norðanmennirnir, so stríddust teir manniliga, og høvdu teir eisini krígseydnuna við sær tað fyrstu tíðina, og varð um reppið at teir tóku høvuðsstaðin Washington. Herovastarnir, Robert E. Lee og Thomas Jackson vunnu stórar sigrar, og tað sáddi ein stóran iva í part av almenninginum í norðurstatunum, um tað var tað vert at kríggjast ímóti suðurstatunum. Bløðini prentaðu langar listar við monnum, sum vóru dripnir undir hørðu bardøgunum, og fólk vóru skelkaði um tað stóra talið. Men í juli 1863 vendi krígseydnan hjá norðanmonnum í býnum Gettysburg í Pennsylvania, og frá tí degnum vóru norðurstatirnir omaná.

Sunnanmenn bardust manniliga fram til 9. april í 1865. Men tá máttu teir konstatera, at norðanmennirnir vóru ov nógvir í tali, og vóru nógv betri útgjørdir. Robert E. Lee sá skriftina á vegginum, og valdi at geva seg yvir til Ulysses S. Grant, tann 9. apríl í 1865. 260.000 suðurstatshermenn og 360.000 norðurstatshermenn høvdu latið lív í borgarakrígnum.

Lincoln var eisini undir trýsti frá fólkum í norðurstatunum, sum ynsktu at at enda kríggið skjótast møguligt, og viðurkenna suðurstatirnar, sum eitt lógligt ríki. Tey vildu sleppa undan fleiri deyðsføllum á vígvøllunum, selja prinsippini, fyri at sleppa undan bardøgunum, og at fáa frið. Fyrsti herovastin hjá Abraham Lincoln,

George McLellan gjørdist eisini firtin inn á forsetan, tí hann segði úr starvi, sum ovasta herleiðara fyri herin hjá norðurstatunum. George McLellan var so hevndarhugaður, at hann stillaði upp ímóti Lincoln til forsetavalið í 1864. Lincoln kom kortini sigrandi úr valinum, ikki minst tí, at nógvir av hermonnunum hjá norðurstatunum valdu hann til forseta. Hóast hann arbeiddi næstan allan sólarkringin, so gav Lincoln sær eisini tíð til at skriv persónlig brøv til fólk, sum høvdu mist sínu kæru í borgarakrígnum.

Tiltikið er eitt bræv, sum Lincoln skrivaði til frú Bixby í Boston, sum hevði mist allar fimm synirnar í borgara-krígnum. Mangan verður sipað til hetta brævið, sum eitt dømi um tað menniskjaligu umsorganina, sum Lincoln hevði fyri sínum medmenniskjum. Men líðingarnar undir borgarakrígnum bóru okkurt gott við sær. Tann 22. september í 1862 kunngjørdi Abraham Lincoln, at trælahaldið fór at verða upphevjað í USA. Lógin kom í gildi tann 1. januar í 1863. Og Lincoln kom at gerast tann stóri bjargingarmaðurin hjá svørtu trælunum.

Tá Lincoln kom koyrandi inn til høvuðsstaðin hjá suðurstatunum, Richmond, bleiv hestavognurin hjá forsetanum umgyrdur av trælum, sum vóru settir í frælsið, og sum vildu heiðra "Faðir Abraham", sum hevði givið teimum hetta frælsið.

## Drúgv jarðarferð

Lincoln valdi nógvar av sínum gomlu mótstøðumonnum at sita í amerikonsku stjórnini, fyri at kunna hava eina savnandi stjórn, sum kundi bera gjøgnum alt borgararkríggið. Nógvir politiskir eygleiðarar hava samanborið Barrack Obama við Abraham Lincoln á hesum økinum, har Obama hevur valt Hillary Clinton til uttanríkisráðharra.

Tá borgarakríggið var vunnið, eggjaði Lincoln eisini íbúgvunum í norðurstatunum at bjóða sunnanfólkunum vælafturkomin í samveldisríki. Men hóast hann royndi at sameina og reinsa stóru sárini, sum ein ræðulig orrusta millum norður og suður hevði við sær, so var tað ein blóðtystur sjónleikari, sum ikki dugdi at síggja nakað virðið í hesum.

John Wilkes Booth myrdi Abraham Lincoln í Ford-sjónleikarahúsinum í Washington. Men morðið økti bara um illviljan millum norðanfólkini ímóti suðurstatunum, og sameiningin fekk eina ringa byrjan. Morðið á Lincoln kom sum ein skelkur. Í øllum stórbýunum boðaðu kirkjuklokkarnar frá feigdarboðunum, og fløggini fóru á hálva stong kring alt landið.

Kistan við Lincoln fór á eina ferð, sum vardi heilar 12 dagar, sum var runt alt USA. Tá kistan kom til New Salem, hevði hon ferðast 3.000 kilometrar, og 7 miljónir fólk høvdu sæð kistuna, áðrenn hon kom fram til tað síðsta hvíldarstaðið í New Salem í statinum Illinois.

## Minnini liva

Men minni um Abraham Lincoln er alt annað enn jarðað. Lincoln er enn millum mest umtalaðu og siteraðu forsetarnar í søguni hjá USA. Tað eru kanska bara George Washington og Franklin Delano Roosevelt, sum standa honum kurl.

Ein stórsligin minnisvarði er í Washington, og motiv av Abraham Lincoln hava verið á myntum, pengaseðlum og á frímerkjum. Røðan hann helt aftaná sigurin í Gettysburg vardi bert 2 minuttir, men er tann mest endurgivna røðan í amerikanskari søgu, og er millum lesiætlanirnar í amerikonskum skúlum. Ein partur av Gettysburgtaluni hjá Abraham Lincoln ljóðar soleiðis:

- Fyri fýra sneisum og sjey árum síðani skapaðu fedrar okkara eina nýggja tjóð í hesum heimspartunum, fødd í frælsi, og givin til sannleikan um, at øll menniskju eru fødd líka. Nú standa vit mitt í einum borgarakríggi, sum er royndin, um tjóðin, ella nøkur onnur tjóð, sum er, og er innvígd á sama hátt sum vit kann standa.

Vit standa her á einum av teimum stóru vígvøllunum. Vit eru komin her, fyri at innvíga ein part av vígvøllinum, sum síðsta hvíldarstaðið hjá teimum, sum doyðu her, fyri at tjóðin kann liva.....fyri, at leiðslan av fólkinum, við fólkinum, fyri fólkinum ikki skal ganga til grundar her í Heiminum.